# Sosialurin

Nr. 60 Hósdagur • 27. mars 2003 • 77. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo









Felagið Sinnisbati:

## Ógvuliga vónbrotin av løgmanni

Síða 7



Sálarfrøðingur um sjálvmorð

## Sorg er kærleikans prísur

Síða 12-13



Hagen Jørgensen:

## Brúkarar mugu standa saman

Síða 14-15



# Donsk hernaðarlóg kroyst yvir føroyingar

**Deyðarevsingin í Føroyum hevur loksins fingið banahøgg. Men tað er ikki á tann hátt, sum føroyskir myndugleikar ynsktu. Ríkisumboðið setir donsku hernaðarlógina í gildi fyri Føroyar uttan at spyrja føroyingar eftir. Løgtingið samtykti í staðin, at deyðarevsingin varð tikin av við serlóg. Høgni Hoydal, landsstýrismaður, kallar støðuna absurda**








